# Nú verður fyrsti formurin fyltur á Stórutrøð

**Ólavur í Beiti tann 15/10/2008 kl. 13:13**



Í dag er spenningurin stórur á Stórutrøð, har fyrsti formurin til nýggja barnagarðin verður fyltur.

Hetta er nevniliga ikki ein heilt vanligur formur, sum verður fyltur. Sum áður nevnt her á Vágaportalinum er hetta slagi av formum púra nýtt í Føroyum. Hesir eru óvanligir á tann hátt at teir skula ikki takast niðuraftur, men verða standandi, tí samstundis sum teir eru formar, eisini eru isolering á bæði út- og innsíðuni.

Hans Magnussen frá Dalsbø sp/f, sum ger arbeiði sigur, at higartil sær tað gott út. Hann var entá so bersøgin og helt fyri, at um hetta riggaði væl kundi hann eins væl sleppa sær av við gomlu formarnar, tí hetta verður framtíðin.

Tað hevur annars gingið væl at seta upp, tóat nógvi vindurin herfyri tarnaði arbeiðinum nakað. Tilfarið er í høvuðsheitinum samanpressa flamingo-líknandi og er tí sera lætt, so illveður kann darva uppsetanina.

Barnagarðurin verður væntandi liðugur at stoypa í februar komandi ár.

Um tú veitst okkurt, sum Vágaportalurin ikki veit - skriva so til beiti@kallnet.fo